**Semja millum**

**Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

1. Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið 1.10.2012 til 1.10.2015

2. Lønarhækkanir

   Tann 1. oktober í 2012 hækka mánaðarlønir 32.000 kr. og undir við 440 kr. Mánaðarlønir 50.000 kr. og yvir hækka ikki. Linjurætt fall harímillum.

   Tann 1. oktober 2013 hækka mánaðarlønirnar 190 kr. + 0,9%

   Tann 1. oktober 2014 hækka mánaðarlønirnar 1,9%

3. § 3, stk. 1. verður soljóðandi: »Tá ið tað á einari deild starvast í minsta lagi 5 limir í Starvsmannafelagnum, hava hesir limir rætt at velja eitt álitisfólk. Álitisfólk og nevndarlimir kunnu ikki verða uppsøgd, uttan at uppsøgnin hevur verið til viðgerðar millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.«

4. § 12 verður soljóðandi: »Starvsfólk, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi fyribils røkja hægri starv í 1 viku samfelt ella meira, skulu í hesum tíðarskeiði verða lønt við somu løn, sum tey høvdu fingið, um tey vórðu sett í starvið sambært hesum sáttmálanum, treytað av, at tey yvirtaka tær arbeiðsgávur, ið standast av hægra starvinum.«

5. § 6, stk. 4 verður soljóðandi: »Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólki úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið felagnum og starvsfólkinum til ummælis við minst 14 daga freist. Inniheldur ætlanarskrivið eymar upplýsingar sambært § 27 í fyrisitingarlógini, verður ein fráboðan send Starvsmannafelagnum um, at eitt ætlanarskriv av hesum slag verður sent starvsfólkinum, samstundis sum tað sent verður starvsfólkinum«

6. Vaktargjaldið fyri sløkkiliðsfólk hækkar í sáttmálaskeiðnum við 1% um árið, soleiðis at vaktargjaldið 1. Oktober 2014 er 14%. Gjaldið fyri kaving verður kr. 100,00.

7. Í § 26 verður sett inn nýtt stk.7: Undir heilt serligum umstøðum, tá ið arbeitt verður út í eitt aftaná vanliga arbeiðstíð, verða reglurnar um úrtíðarløn at galda fyri alla hesa tíðina, ið arbeitt verður. Aftaná 3. yvirtíma gerandisdagar verður latin úrtíðarløn við hægstu

viðbót fyri allar tímarnar, ið arbeitt verður. Áðrenn farið verður undir at gjalda vanliga løn aftur, skulu treytirnar í §42 í Løgtingslóg nr. 70 frá 11.05.2000 um arbeiðsumhvørvið verða uppfyltar. Hini stk. í § 26 skifta nummar.

**8.** Í § 31, stk.1, 1.punktum verður orðingin »áløgd yvirtíð« sett aftrat orðingini »Uppspardar tímar«
§ 31, stk.1, 1.punktum verður soljóðandi: »Uppspardar tímar, áløgd yvirtíð og ymisk gjøld (vaktargjøld, gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð og líknandi) verða givin sum gjald ella sum avspákan.«

**9.** Í § 32, stk.1 verður setningurin »Skeiðtíðin verður harumframt tald við í skyldugu arbeiðstíðina, tó við mesta lagi 7,8 tímum hvønn skeiðdagin verður strikaður.« strikaður.

**10.** Í § 39, stk.2 verður eftir »í løn hansara.« sett aftrat: »Verður skúlagongdin uttanfyri vanligu arbeiðstíðina, skal hetta gevast aftur í vanligum tímatali.«

**11.** § 41 Starvsmetingarnevnd.
Strika orðingin *"er semja ikki í starvsmetingarnevndini um flokkingarmál, verður málið sent til starvsmetingarnevndina millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, sum hevur úttalilsisrætt.*

**12.** § 42 stk. 2 verður soljóðandi: »Partarnir eru samdir um 1. oktober 2013 at umrøða § 36 í sáttmálanum, um munandi broytingar, ið hava ávirkan á lønarlagið, eru farnar fram í samfelagnum. Hendan áseting kann ikki føra til, at sáttmálin verður uppsagdur í sáttmálaskeiðnum.«

**13.** Settur verður ein arbeiðsbólkur umboðandi Tórshavnar Kommunu, Tórshavnar Havn og Sløkkiliðið saman við umboðum fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið at endurskoða og dagføra serreglurnar fyri Havnaumsjónarmenn, Klinikkassistentar, Tannrøktarar og Sløkkiliðsfólk.

**14.** Greina lønarflokkingar hjá KT-fólki í starvsmetingarnevndini

**15.** Lønarstigin verður longdur til at hava 50 stig

**16.** Við gildi frá 1. oktober 2013 verða umflokkingar gjørdar á hesum økjum: Tannrøkrarar, deildarleiðarar I, II og III. Kostnaðurin verður roknaður og tikin av karminum tann 1. oktober í 2013.

**17. Serfrøðingi III** verður flokkað frá stig 34 til 40.

18. **Dagrøktararsáttálin**. § 14, nýtt stk. 4. Um ein dagrøktari hevur 3 børn undir 2 ár í ansing, telja børnini við 33,3% av mánaðarlønini. Hini stk. í § 14 skifta nummar.

19. **Sáttmálin hjá S.E.V.**
Fyri arbeiði í kvøld- og náttarvakt eiga starvsfólk frí 3 tímar fyri hvørjar 40 tímar, arbeitt verður.

20. Flokkingarnar av størvunum í sáttmálanum fyri S.E.V. verða endurskoðaðar.

21. **Rúmligi arbeiðsmarknaðurin**
Kommunali arbeiðsgevarin vil vísa vælvild og rúmd mótvegis fólki við skerdum førleikum, starvsfólki, sum gerast sjúk meðan tey eru í arbeiði, ella koma út fyri vanlukkum, so hesi kunnu hava ella varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Hetta kann m.a. gerast so at hesir starvsbólkar fáa serliga tillagaðar setanartreytir. Við støði í vanligu ásetingunum í sáttmálanum eigur sostatt at bera til at lata arbeiði vera gjørt undir serligum treytum.

22. **Felags lønarskipan.**
Tá sáttmálasamráðingarnar eru loknar fara partarnir undir at arbeiða við eini almennari lønarskipan. Tá semjan verður undirskrivað, verður fundur avtalaður at gera neyðugu fyrireikingarnar og síðan byrjar arbeiði at fáa eina felags almenna lønarskipan.

23. **Felags átak**
Partarnir eru samdir um at fara undir í felag at skipa fyri átøkum, sum kunnu økja trivnaðin í tí kommunala geiranum.

*Í Tórshavn tann 23. oktober í 2012*

*Starvsmannafelagið*

[signatures]

*Kommunala Arbeiðsgevarafelagið*

[signatures]